apoteksverkið

# Skamtan

Kunning um skamtaðan heilivág



## **Hvat er** skamtan?

Skamtan er ein tænasta, sum apotekið veitir. Í skamtan verður tín heilivágur pakkaður í smáar posar. Hvør posi er til ásetta tíð, sum t.d. á morgni, døgurða og kvøldi. Posarnir hanga saman í eini rullu í tí raðfylgju, sum teir skulu takast, og hvør rulla er vanliga til 14 dagar. Á hvørjum posa er týðiliga merkt:

- **Hvør skal taka heilivágin**
- **Hvat fyri heilivágur er í**
- **Nær heilivágurin skal takast**



Øll kunnu fáa skamtan, men hóskar hetta seg serliga til tey, sum taka fleiri sløg av heilivági ymiskar tíðir á degnum, ella sum av øðrum orsakum tørva hjálp í sambandi við heilivágin, sum verður tikin.



## **Hvussu kann eg** fáa skamtan?

Tað er læknin, sum sendir skamtanartoyminum á apotekinum skamtanarforskrift gjøgnum talgildu heilsu-skipanina. Tí skalt tú seta teg í samband við læknan, um tú ynskir at fáa skamtan.

Harumframt skalt tú melda teg til sjálvvirkandi GjaldSkipanina.

## Tilmelding til sjálvirkandi **GjaldSkipanina**

Fyll tilmeldingarskjalið „Tilmelding til skamtan“ út og send tað til **skamtan@apotek.fo** ella lat tað inn á nærmasta apoteki.

Tilmeldingarskjalið er á heimasíðuni **apotek.fo/heilsutaenastur/skamtan**, og tað kann eisini fáast á apotekunum.



Tilmelding til skamtan

apoteksverkið

Persónligir upplýsingar
Navn:
Føðingardagur/P-tal: Telefonnr.:
Konta í peningastovni:
Reg.nr.: Kontonr.:

Kontaktpersónur / avvarðandi
Navn: Telefonnr.:
Eg fái fasta vitjan av sjúkrarøktarfrøðingi hjá heimatænastuni Ja ☐ Nei ☐

Viðvíkjandi útflýggjan av skamtanarheilivági (set X)
☐ Eg ynski at fáa heilivágin koyrdan til hús 14. hvønn dag
Skal sendast til:

Eg ynski at heinta heilivágin 14. hvønn dag á apotekinum:
☐ Tjaldurs Apotek ☐ Norðoya Apotek
☐ Apotekið í Steinatúni ☐ Eysturoyar Apotek
☐ Suðuroyar Apotek

Avtalan skal vera galdandi fyri skamtan og tilhoyrandi apotek
Set X við tilhoyrandi apotek:
☐ Tjaldurs Apotek / Apotekið Steinatún ☐ Norðoya Apotek
☐ Eysturoyar Apotek ☐ Suðuroyar Apotek

Hervið verður heimilað Apoteksverkinum at melda meg til GjaldSkipanina hjá Elektron. Gjaldið fyri heilivág og annað, ið verður útflýggjað til mín, skal takast av míni kontu, tá Apoteksverkið sendir boð um hetta. Skjalið verður goymt talgilt í okkara skipan.

Dagfesting: Váttan / Undirskrift:

Framleiðsluapotekið • Skamtanartoymið • Staravegur 15 • 100 Tórshavn • tel. 40 40 84 • skamtan@apotek.fo • www.apotek.fo

# **Nær byrjar** skamtanin?

Tá læknin hevur sent okkum skamtanarforskriftina, og tú hevur meldað teg til Gjald-Skipanina, kann skamtanin byrja innan 14 dagar.

Skamtanartoymið setur seg í samband við teg ella kontakt-persónin, sum stendur á tilmeld-ingarskjalinum, fyri at áseta, nær skamtanin skal byrja.

Tú fært vegleiðing um skamtan, tá ið tann fyrsti pakkin verður útflýggjaður. Hetta fer fram inni á apotekinum; av heimatænastuni; av røktarstarvsfólki ella umvegis telefon av skamtanartoyminum.

**Fyrstu ferð tú fært skamtan, fært tú:**

- Fyrstu skamtanarrulluna
- Ein plastbakka at leggja skamtanarrullur í
- Eitt yvirlit yvir heilivágin (eitt sokallað skamtanarkort)

Eini 4 dagar áðrenn skamtan-arrullan er tóm, kemur næsta skamtanarrullan við postinum. Um tú hevur valt at koma eftir skamtanini á apotekinum, kanst tú gera tað, 4 dagar áðrenn skamtanarrullan er tóm.

## **Leiðbeining um** hvussu skamtposin verður upplatin



**1.** Millum posarnar eru smá hol. Skræðið posan, sum skal nýtast, eftir holunum.



**2.** Skræðið síðuna á posanum *(sí pílar niðanfyri)* Ansið eftir ikki at skræða posan úti við hornini.

# Yvirlit yvir **heilivágin**

Skamtanarkortið gevur tær yvirlit yvir skamtaða heilivágin. Her sært tú, nær heilivágurin skal takast, og hvussu tablettir-nar ella hylkini síggja út.

Tú fært eitt skamtanarkort við fyrstu rulluni, og síðani hvørja ferð broyting er í heilivágnum. Læknin sær skamtanarkortið í talgildu heilsuskipanini.



**Framleiðsluapotekið**
Skamtan Tlf: 404084

**Skamtanarkort**

Síða 1 av 1

P-tal: 010101dk5
Navn: [redacted]

Pakkibólkur: 81 - Suðuroy/Einst/ Suður

Debitorkonta:
Kontaktpersónur:

Læknaviðtala:

| Vørunr. | Heilivágur | Firmanavn | Innihaldsevni | Lýsing av tablett | At geva fyri | kl. 7.30 | kl. 08 | kl. 18 | kl. 22 | Lækni | Fer úr gildið |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 224118 | Unikalk Fort 400/19ml | | | | | | | | | | |
| 037853 | Kaleorid 750 mg. | Karo Pharma AB | Kalium | | kálkiskoyti | | 1,00 | | | [redacted] | 07-05-2025 |
| 085617 | Ferro Duretter 100 mg | ACO Hud Nordic | Ferro-jern | | kaliumiskoyti | | 1,00 | | | [redacted] | 07-05-2025 |
| 530586 | Bendroza 2,5+573 mg | Teva | Bendroflumethiazi+ Kalium | | jarniskoyti | | | 1,00 | | [redacted] | 07-05-2025 |
| 058140 | Alendronat 70 mg | Sandoz | Alendronsyre | | fyri blóðtrýstð | | 1,00 | | | [redacted] | 07-05-2025 |
| 083644 | Panodil 500 mg. | GlaxoSmithKline Consumer | Paracetamol | | Mánadag 1/2 tíma áðrenn morgunmat. Fyri beinagrindina | 1,00* | | | | [redacted] | 07-05-2025 |
| | | | | | fyri pínu | | 2,00 | | 2,00 | [redacted] | 07-05-2025 |
| | | | | | Tilsamans | 1,00 | 5,00 | 1,00 | 2,00 | | |

Skamtanarkort góðkent: 08-05-2023

Útgáva: 1 D00001531

Kunning um og mynd av heilivági finnst á min.medicin.dk. Til ber at finna heilivágin við at skriva vørunr. í søkiteigin. Trýst á "Foto og identifikation".

# Vangin

Um tú hevur Vangan **(sí vangin.fo)**, kanst tú síggja, hvør heilivágur hjá tær er í skamtan, nær næsta rulla byrjar, og hvat tú hevur goldið fyri hvørja skamtanarrullu.

## **Broytingar**
## í heiliválgnum

Um læknin ger broyting í heilivágnum hjá tær, fáa vit á apotekinum boðini so skjótt, sum læknin hevur broytt tað í talgildu heilsuskipanini.

Fyri at broytingin skal koma við í næstu rullu, má hetta gerast í minsta lagi 1 viku áðrenn, skamtanarrullan verður uppi. Men um læknin ger vart við, at hetta ikki kann bíða, so pakka vit sjálvandi heilivágin fyrr.



## **Tvey ár**
## uttan broyting

Er heilivágurin óbroyttur í tvey ár, skalt tú seta teg í samband við læknan og biðja um at endurskoða viðgerðina, so at skamtanin kann halda fram. Læknin fær eisini eina áminning frá skamtanartoyminum um at endurskoða viðgerðina.

Á skamtanarkortinum sæst, nær skamtanarforskriftin fer úr gildi.

## **Hvat kostar tað**
## at fáa skamtan?

Tá tú fært skamtan, rindar tú fyri einstøku tablettirnar og hylkini, sum eru í skamtarnar-rulluni. Aftur at tí kemur eitt pakkigjald.

Somu tilskotstreytir eru galdandi fyri skamtaðan heilivág sum fyri annan heilivág, ið tilskot verður veitt til. Heilsutrygd letur eisini tilskot til pakkigjaldið, um heilivágurin er tilskotsheimilaður.

Tú kanst lesa nærri um tilskot til heilivág á **apotek.fo/stuðul-til-heilivag**. Har sært tú eisini, hvat tú í mesta lagi kemur at gjalda um árið, um heilivágurin er tilskotsheimilaður.

Gjaldið fyri heilivág og pakking verður heintað inn umleið eina ferð um mánaðin.

Tað er ókeypis at fáa skamtaða heilivágin sendan heim.



# **Hvør heilivágur kann pakkast** í skamtan?

Flestar vanligar tablettir og hylki kunnu pakkast í skamtan.

Ávísar vitaminir og onnur kostískoyti kunnu eisini verða pakkað í skamtan. Á **apotek.fo/skamtan** sæst, hvørji kostískoyti kunnu verða pakkað.

Uppleysiligar tablettir, smeltitablettir og allar aðrar tablettir, ið draga til seg vætu, kunnu ikki pakkast í skamtan. Somuleiðis verða flestu sløg av antibiotika, hormonum og cytostatika ikki pakkað í skamtan.

Tað ber ikki til at velja ávíst merki av heilivági í skamtan. Hetta er tí, at pakkimaskinan pakkar bert eitt merki av hvørjum heilivági í senn. Sí eisini **apotek.fo/samheitaheilivagur.**

| Tilskud | Udlevering | Dispenseringsform og styrke | Pakning |
|---|---|---|---|
| ● | Recept | Filmovertrukne tabletter 500 mg (kan dosisdisp.) | 100 stk. |

*Á **min.medicin.dk** kanst tú síggja, hvør heilivágur kann pakkast í skamtan, og um tilskot verður veitt.*

*Trýst ynskta heilivágin inn og vel 'priser, pakninger og tilskud'. Um heilivágurin kann pakkast, stendur „kan dosisdisp." undir 'dispenseringsform og styrke'. Um grønur rundingur er undir 'Tilskud' verður vanligt tilskot givið til heilivágin.*

## Út at ferðast?

Um tú skalt út at ferðast, so kann apotekið pakka til 4 vikur. Boða skamtanartoyminum frá í seinasta lagi 1 viku áðrenn.

## Halgidagar

Tá halgidagar eru, pakkar skamtanartoymið ofta niðurfyri. Tá kann henda, at tú fært eina rullu, sum er til 4 vikur. Saman við rulluni verður kunning givin.

## Innlegging á sjúkrahúsi

Er talan um innlegging á sjúkrahúsi, og skamtanin skal steðgast, er tað ein lækni, sum skal steðga hesum inni í talgildu heilsuskipanini. Annars heldur pakking av skamtan fram sum vant.

Tá tú síðani verður útskrivað/ur, er tað eisini ein lækni, sum skal virkja hetta aftur. Næsta rulla kann síðani byrja aftur eftir 7 døgum. Vil læknin hava, at tú skalt fáa heilivágin fyrr, skal skamtanartoymið hava boð.

## Flutt bústað?

Um tú broytir bústað í styttri ella longri tíð, skal skamtanartoymið hava fráboðan um tað, so skamtanarrullurnar kunnu sendast á rætta stað.

## Hvussu burturbeini eg skamtposar á rættan hátt?

Um ein skamtanarrulla skal burturbeinast, skulu skamtposarnir tømast, og heilivágurin verða latin inn á apotekið at burturbeina. Sjálvar posarnar við persónsviðkvæmu upplýsingunum skal apotekið ikki hava.





apoteksverkið

**Tlf. 40 40 40**
**skamtan@apotek.fo**

Telefontíð gerandisdagar:

**Apotekini** 9–16

sendistovan